VÁGA KOMMUNA

Reglugerð

um endurgjald fyri stuðlamúr og garð móti kommunalum vegi

§ 1. Endamál

Henda reglugerð ásetir treytir og mannagongdir fyri, nær og hvussu Vága kommuna kann veita endurgjald fyri betong og armering, til stuðlamúr ella garð móti kommunalum vegi.

§ 2. Umsiting

Tað er tekniska nevnd saman við fíggjarnevndini, sum umsitur reglugerðina.

§ 3. Treytir fyri endurgjaldi

1. Har eingin garður er frammanundan, og Vága kommuna er granni, kann viðkomandi, áðrenn arbeiðið verður sett í verk, søkja Vága kommunu um endurgjald fyri betong og armering, sum fer í garðin.
2. Endurgjald kann verða veitt, tá kommunalur vegur er hægri ella lægri enn lendið, eitt nú tá sethús standa niðan fyri veg, og neyðugt er at gera stuðlamúr fyri at gera túnið ella lendið liðugt.
3. Endurgjald verður ikki veitt fyri arbeiðsløn.

§ 4. Umfatar

1. Tá talan er um stoyptan garð, har eingin garður er frammanundan, í mark við almennan veg, gongugøtu, spælipláss ella líknandi hjá Vága kommunu, kann endurgjald verða játtað.
2. Endurgjald verður latið fyri betonggarð:
    - Upp til 25 cm breiðan
    - Upp til 60 cm høgan
    - Í mesta lagi 25 metrar langan
      Er garðurin størri enn ásett omanfyri, verður endurgjald ikki goldið fyri tað, sum er omanfyri nevndu mørk.
3. Markar garðurin upp at kommunalari ogn á tveimum ella fleiri síðum, kann endurgjald latast fyri í mesta lagi 25 m x tal av síðum.
4. Er garðurin minni enn 25 cm x 60 cm, verður rúmdin (m^3) útroknað, og endurgjald goldið út frá tí.

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

5. Endurgjaldsupphæddin verður roknað út frá dagskostnaði av betongi, veitt við pumpubili, og armering, íroknað mvg. Við at vísa á fakturar.

   Um betong verður blandað við hond (blandimaskin) verður goldið 2500,-kr íroknað mvg pr. rúmmetrar av betong.

§ 5. Góðkenning og útgjald

1. Dimensiónir og hæddir skulu verða góðkendar av Teknisku nevnd.
2. Tekniska nevnd skal hava upplýsingar um kostnaðin av byggingini og gera tilmæli til fíggjarnevndina, áðrenn endurgjald verður útgoldið.
3. Goldið verður bert fyri gjørt og góðkent arbeiði, og endurgjald verður bert latið eina ferð.
4. Tá arbeiðið er framt og endurgjald goldið, ábyrgdast Vága kommuna ikki fyri framtíðar broytingum og umvælingum av garðinum.

§ 6. Tulking og avgerðir

1. Møgulig ivamál um tulking av reglugerðini verða at leggja fyri kommunustýrið til avgerðar.
2. Endurgjald kann einans verða játtað eftir skrivligari umsókn, og avgerð skal verða tikin áður enn arbeiðið verður sett í verk.

§ 7. Fyrireikingar og metingar

Í sambandi við útstykkingar, nýggjar vegir, umvælingar ella broytingar av verandi vegum, skal tekniska nevnd, umvegis fíggjarnevndina, leggja eina meting fyri kommunustýrið av møguligum kostnaði, ið henda reglugerð kann hava við sær, og um borgarar møguliga skulu fáa endurgjald sambært reglugerðini.

§ 8. Gildiskoma

Reglugerðin kemur í gildi, tá hon er samtykt av fíggjarnevndini. Samstundis fer gamla reglugerðin úr gildið. ***Samtykt á fíggjarnevndarfundi 20.10.2025***

Vága kommuna

Bjarni Prior

borgarstjóri